


Hevur tú nakrantíð hugt, um vættrar eru á loftinum ella í kjallaranum hjá tykkum? Oivað bugva ein ella tveir har, tí vættrar finnast nevniliga í næstan hvørjum húsi í Føroyum. Men nú í desember mánaða eru bert teir elligomlu og teir sjuku vættrarnir við hús. Allir hinir eru í vættratholuni í Nólsoynni; og í jólasognuni í dag kanst tú lesa um, hvat teir har takast við.

Tú hevur kanska longu bakað nakrar køkur til jóla; men ongantíð manst tú hava roynt at bakað eitt køkuhús. Í miðteiginum í dag vísa vit tær, hvussu tú skalt gera. Umráðandi er, at tú ert nærlagdur við støddini á húsanstykkjunum, soleiðis at húsið verður beint, tá tað verður sett saman.

Uppskriftin hjá okkum kann eisini nytast til smákøkur. Um tú stingur hol í onkrar av jólakøkunum, áðrenn tær fara í ovnin, kanst tú seinni binda reytt band í og heingja tær upp sum jólapynt, t.d. á hurðina, í lampuna ella á jólatræið.


Heilsan

Elin & Annika

Deiggj til køkumyndir ella eitt køkuhús

150 gramm (umf. 2 dl) av sukri
250 gramm av siroppi
150 gramm av smari ella margarini
1 teskeið av stoyttum ingiferi
3 teskeiðir av stoyttum kaneli
½ teskeið av stoyttum nelikum
2 teskeiðir av natron
1 egg
550 gramm (umf. 9½ dl) av mjøli.

Smelta sukur, siropp og fitievni saman. Rør kryddvørur og natrón í. Tá deiggið er flott, rørir tú egg og mjøl í. Elt deiggið og lat tað standa í 1 tima ella til dagin eftir. Rulla tað síðani út, umleið ½ cm til tjúgdar, og sker køkumyndir ella eitt køkuhús úr ti. Baka køkustykkini í umleið 8 min. við 200°, og pynta tey við glasing, tá tey eru kolnað.




Glasing til køkuhús

125 gramm (umf. 2½ dl) av flørsukri
1 eggjahvíta
1 teskeið av sítrónserji

Rør flørsukur og eggjahvíta væl saman, til deiggið er verðið seigt. Síðani letur tú sítrónserju í. Fyll ta lidnu glasingina í kramarhús gjørd úr bakipappiri, og klipp eitt sindur av endanum, so gjørligt er at spræna glasingina á køkustykkini. Lat hana torna í umleið 2 timar.

Soleiðis gert tú køkuhúsið

Á tekningini sært tú støddina á teimum einstoku køkuhússtykkjunum. Pynta stykkini við glasering, áðrenn tú limar tey saman við ti flogva karamelludeigginum. Dyppa kantarnar á stykkjunum í karamelludeiggið og tryst teir saman, til karamellan er stivnað. Lima fyrst veggirnar og skjeldrarnar, og at enda takið. Eisini ber til at lima ymiskt goðgætt á húsið við karameludeigginum. Og vakurt sær tað út at gera eitt steintún runt um húsið av piparnetum, sum vist á tekningini.



Karamella

(til at líma húsið saman við)
180 gramm (umf. 2 dl) av sukri.

Smelta sukrið á eini pannu, og skrúva niður á lágan hitan, so karamelludeiggið heldur fram við at vera flotandi, meðan køkustykkini límast saman.







JÓLAFYRIBRIGDI

Jól

Orðið «jól» hevur tveir týdningar, sum eru rættiliga ymiskir. Ahugavert er at leggja til merkis, at tað føroyska orðið «jól» er eitt fleirtalsorð, meðan tað samsvarandi danska orðið «jul» er vorðið eintalsorð. Hetta lýsir væl ta gongd, jólini gjøgnum søguna hava havt. Tey eru broytt frá at vera fleiri heidnar jólaveitslur, sum t.d. hjá rómverjunum, til at vera ein kristin jólafest, sum tey jólini, vit halda í Føroyum nú á døgum.

Jólahalgan

Í Norðurlondum var í miðaldini friðar lýstur at vera um jólahalguna. Samboðrt kirkjulógunum áttu allar trætur tá at vera gloymdar. Allur harðskapur varð revsaður nógv harðari enn vanligt, tí ikki bert var hann brot á lógina, men eisini brot á sjálvan gudsfriðin. Harðskapur um jólahalguna var halgibrot.

At geva og at vera góður var týdningarmikið um halguna, og var ein ikki tað, so misti ein jólagleðina. Tí var umráðandi at blíðskapur varð vístur gestum á jólum.

Tey hildu fyrr, at sólin stóð still á himmalinum um jólini. Líkt er til, at henda forna pátrúgvin hevur verið upprunin til síðn um, at einki grovt arbeiði mátti gerast tá. Ein onnur frágreiðing er tann, at katolskir prestar í miðaldini virkaðu fyri at arbeiði á helligdøgum skuldi vera bannlýst.

JÓLAHALD Í FØROYUM FYRR

Jólahalgan

Jólamorgun vóru jólini komin, og halgan byrjað. Men ymiskt var, hvussu leingi jólatíðin var roknað at vera. Summa staðni søgdu tey, at jólini endaðu 13. dagin eftir jólamorgun (6. januar), men aðra staðni var jólahalgan ikki hildin at enda fyrr enn 20. dagin (13. januar). Gamalt var at kalla hesa tíðina «millum jólanna».

Síður var, at ongan dag í halguni mátti nákað ambað snara runt í húsinum, og einki mátti standa uppi á vevi, sum skuldi verða til mannfolkaklæði. Nógvar vóru søgurnar um skaðatilburðir, tí at menn vóru í klæðum, sum konufolk høvdu virkað hesa tíðina.

Tá einki kundi gerast upp á mannfólkið, var lítið annað at fáa frá hondini. Tí var fritíðin hjá arbeiðsgentuni í nógvum húsum løgd um jólini.

Stjørnuhalgi

Í sambandi við jólatíðina var «stjørnuhalgi» hildin. T.v.s. at frá ti. til sjeystjørnan sást á himmalinum og til songartíð, var ikki nevðugt at arbeiða. Tá var efta farið at spæla kort, at telva ella at vitja út í onnur hús.

Jólabygdir

Summar bygdir vórðu kallaðar «jólabygdir», ti haðar komu nógvir jólagestir. Hetta vóru ætt ella kenningar, sum stundum komu til bygdina at halda jól. Væl varð tikið ímóti gestunum. Yvirhøvur var siður um allar Føroyar, at øll, sum inn komu millum jólanna, vórðu boðin til borðs, tí eingin mátti «bera jólini út aftur».

JÓLAHALD Í ØÐRUM LONDUM

India

Í Indu er meginparturin av fólkinum hinduar ella buddistar. Nøkur kristin eru tó, t.d. borgarnir, sum búgva á slættanum norðan fyri Brahma-putraánna.

Beint fyri jól hevur regntíð verið, og tí mugu tey umframt jólastakanina gera húsini í stand aftur, samstundis sum økurin eisini skal skerast. Ein av døgunum fer øll familjan á torgið at keypa jólastáss. Ikki altíð eru ráð til jólapynt, og so má avispappir biddast í staðin.

Jólaaftan verður farið í kirkjuna, sum er pyntað við greinum og bananplantum. Spælt verður á hondorgul, heimagjørdar fiðlir og bambusfloytur á veg í og úr kirkju umframt í kirkjuni aftan á gudstænastuna. Um nátt ina vitja folk hvønn annan. Tey drekka te, syngja sálmar og spæla uppá ymisk hjóðføri.

Jóladagsmorgun pynta børnini uttan fyri húsið við jólapynti. Farið verður í kirkju, og øll eru stáskløddi við hárinum smurdum inn í olju. Genturnar hava harumframt sloyfur og blómur í hárinum. Aftan á gudstænastuna hugna tey sær í havanum uttan fyri kirkjuna. Har vaksa m.a. blómurnar «jólastørnan», sum vit eisini kenna í Føroyum. Men í Indu eru hesar blómur fleiri metrar høgar.

Næstu dagarnar fara fleiri ung ofta saman hús úr húsi at syngja og dansa, og annars verður vitjað hjá ætt og vinum.

Vættraholan í Nólsoynni

Hevur nú nakrantíð borið eyga við royk ovast uppi úr toppinum á Nólsoynni? Tað er vættramamman, sum kókar greyt til vættrarnar.

Alt innan í ti stóra fjallinum í Nólsoynni er nevniliga ein stór høll, har verkstaðurin hjá vættrunum er.

Vættrar finnast nógva staðni í Føroyum, men síðst í november mánaða gera teir seg allir til reiðar at fara til vættraholuna í Nólsoynni. Har møtast teir 1. desember ár undan ári at gera jólagávur til øll tey skikkiligu børnini í Føroyum.

Hendan sama dagin halda teir fund um, hvussu arbeiðið skal leggjast til rættis, og dagurin er sera tydningarmikil, tí tá kemur jólamaðurin at leggja teimum lag á. Av ti at vættrarnir koma úr næstan hvørjum húsi í Føroyum, vita teir, hvat hvørt barnið ynskir sær; men flestu royndirnar at fyrireika jólini hevur jólamaðurin. Ikki bert tó til hjá honum at vera hjástaddur allan desember mánaða, tí hann hevur jú eisini nógv um at vera aðra staðni í verðini.

Tá fundurin er lokin, setir vættramamman greytin á borðið, og nógv verður eftir í fjallinum. Tá man okkurt hava lagt seg imillum, soleiðis at lúkan ikki er farin heilt aftur.

Eftir hetta kemur jólamaðurin ikki aftur fyrr enn sjálvan jólaaftan. Vættrarnar hava tó úr at gera ta tíðina, sum eftir er, við restini av jólagávunum.

Ein bát hava vættrarnir. Hann stendur eitt sindur til viks inni í holuni ikki so langt frá lúkuni. Tollaksmessudag verður farið undir at rigga bátin til, so hann er klárur til dagin eftir. Gávurnar eiga nú at vera lidnar, og hugt verður eftir á øllum hillunum, um nøkur man vanta í.

Tíðliga jólaaftansmorgun fara vættrarnir í holt við at beina úruddið burtur, tí alt má vera klárt, tá jólamaðurin kemur um kvøldið.

Tá fyrsta stjørnan vísir seg á himmalinum, verður lúkan latin upp, og allir vættrarnir taka í tann tunga bátin og bera hann oman í fjøruna. Síðan skunda teir sær at leggja allar gávurnar niður í hann, áðrenn jólamaðurin kemur. At enda er baturin so stúvstappaður, at bert er pláss fyri jólamannin um og nøkrum fáum vættrum.

Nú siglir báturin runt til allar oyggjarnar í Føroyum við gávunum, og jólamaðurin fer sjálvur hús úr húsi við stóra sekki sínum á baki. Seint er vorðið, áðrenn hann og vættrarnir kunnu sigla aftur til holuna við bátinum.

Eitt árið var um reppið, at nakað barn í Føroyum fekk jólagávu. Báturin við øllum jólagávunum var júst farin um Borðuna á veg til Havnar, tá økkurt løgdi hoyrdist á motorinum. Og lótu seinni lá báturin stillur mitt á Nólsoyarfirði. Jólamaðurin og vættrarnir royndu alt, teir vóru mentir, at fáa gongd á aftur motorin. Men einki hjálpti.

Nú vóru ráðni dýr, tí hvussu skuldu teir nú sleppa runt til øll børnini í Føroyum?

Tá sást Smyril koma av Havnini, og glaðir vóru teir, tí hann mundi fara at hjálpa teimum úr neyðini.

Men hvussu teir róptu og veipaðu við armunum, líka lítið lætst skiparin um von. Hann sigldi skjótt framvið, tí hann hevði skund og vildi vera í Suðri sum skjótast til jóladagsmorðun. Lítið var annað at gera enn aftur at royna at fáa motorin at ganga, men ikki eydnaðist heldur hesu ferð.

Tá hoyrdist dunið frá Tróndu, sum kom av Skálafjørðinum. Helst for hann at koma teimum til hjálpar.

Skiparin, sum helt teir vera um at søkka, sigldi við skundi yvir ímóti teimum. Men tá ið hann sá jólamannin og gávurnar, skundaði hann sær at sigla framvið, tí ikki helt hann seg hava tíð at sleipa jólagávubátin kring allar Føroyar ein jólaaftan. Tiskil fekk jólamaðurin enn ikki høvi at biðja hann um bert at sleipa bátin til Havnar.

Har lógi teir aftur einsamallir á fjørðinum. Nú høvdu teir mist alla vón um at fáa gávurnar út til børnini hetta kvøldið, og tá Ritan kom vaggandi, ikki so mikið sum hugsaðu teir um at ropa á hana.

Skiparin á Rituni gruna ði tó sjálvur, at okkur alvarsamt mundi vera áfatt, og sigldi tí tætt fram at jólagávubátinum at bjóða teimum hjálp. Jólamaðurin og vættrarnir greiddu frá hvussu vorðið var, og kærdu sína neyð um, at børnini í Føroyum ongar jólagávur fóru at fáa hesi jólini. Tá helt skiparin á Rituni fyri, at hetta fór ikki at bera til, og bað jólamannin nyta skipið hjá sær í staðin.

Frøin var stór, men nú mátti skjótt berast at, um tað skuldi eydnast teimum at bera jólagávurnar út, áðrenn ov seint varð.

Fyrst varð jólagávubátur in sleipaður inn á Havnina, og skiparin lovaði at hyggja at motorinum, meðan jólamaðurin og vættrarnir foru kring Føroyar við Rituni.

Tá ið teir komu aftur á Havnina, var motorurin á bátinum í lagi, og jólamaðurin og vættrarnir sigldu heim til vættraholuna yvir háls og herðar. Teir skundaðu sær at rigga av, soleiðis at eingin skuldi siggja nakað til holuna. Men áðrenn teir høvdu fingið bátin inn um lúkuna, lætti dimmið!

Og í Nólsoy gekk søga um, at sevðamaður hevði sæð fjallið lata seg upp jóladagsmorgun.